FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208

Tórshavn, tann: 4. desember 2025
J.nr.: 25/20102

Stílað: Fíggjarnevndini

Viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 018/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning (Hægri avgjøld á tubbak og snús – fylgilógaruppskot til FLU 2026)

Fíggjarmálaráðið mælir Fíggjarnevndini til at gera eina broyting í lógaruppskotinum, sum Fíggjarmálaráðið hevur lagt fyri Løgtingið.

Í sambandi við løgtingsmál 18/2025, ið hækkar avgjøldini á snús og tubbak, hevur tað víst seg, at broytingin hevur sera stóra ávirkan á leyst snús, ið vanliga verður brúkt í Føroyum (Prima snús).

Fyri at kunna taka nakað av avgjaldshækkingini av hesum snúsinum uttan at ávirka annað snús, er neyðugt at nágreina vøruna. Hetta verður gjørt í Tolllógini við løgtingsmáli 55/2025, har ein undirbólkur 2403.99.35 er settur inn fyri "Snus med indhold af tobak".

TAKS hevur upplýst, at innfluttir vórðu 12.000 pakkar av primasnúsi á 100 gr. í 2024. Broytingaruppskotið lækkar avgjaldið úr 2.000 kr. til 800 kr. pr. kg. Fyri at fíggja hesa lækking verður avgjaldið á sigarettum hækkað við 5 oyrum.

Samlaðu fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum verða sostatt áleið tær somu.

Uppskot til broyting í løgtingslóg um toll (nýtt vørunummar til primasnús) í løgtingsmáli 55/2024 hevur virknað frá framløgudegnum, sum var 2. desember 2025. Uppskotini bæði mugu hava virknað frá sama degi, og tí verður gildiskoman í hesum uppskotinum broytt frá at hava virknað frá framløgudegnum til at hava virknað frá 2. desembur 2025.

Eg fari tí at mæla Fíggjarnevndini til at gera eina broyting í lógaruppskotinum.

Uppskot til orðing av broytingaruppskoti:

1. § 1, nr. 2 verður soljóðandi:

"Í kapitli 24 í frumskjali 1 í skjali 1 verður punktavgjaldið á vørunumrunum 2402.20.10 til 2402.90.00 í 3. teigi broytt frá "100 stk. 145,00 kr." til: "100 stk. 180,00 kr."

2. § 1, nr. 4 verður soljóðandi:

"Í kapitli 24 í frumskjali 1 í skjali 1 verður punktavgjaldið á vørunumrunum 2403.99.20 til 2403.99.90 í 3. teigi broytt frá "144,00 kr. pr. kg." til: "2.000,00 kr. pr. kg.", tó so, at punktavgjaldið á vørunummarið 2403.99.35 verður ásett til "800,00 kr. pr. kg."

3. § 2 verður orðað soleiðis:

"§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 2. desembur 2025."

Tórshavn, 4. desember 2025

Ruth Vang
Landsstýriskvinna í fíggjarmálum